# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini í Sumba

Útskiftingin av Blæing, Heimaraparti, Sumbiar bygd, varð endað við úrskurði sagdur á fundi á Matrikulstovuni 8. mars 2006. Hesin úrskurður verður latin til ákæru frá 11. apríl 2006, sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn. Kærufreistin er 3 mánaðir frá 11. apríl 2006.

Gerðabókin er send eigarunum.

Útskiftingarskjølini liggja frammi á Matrikulstovuni í Tórshavn, til kærufreistin er úti.

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarformaður

# Starlet 29



**Um hóskandi boð fæst, er ein Starlet 29 við 113 Hk/6 cyl.**

Thornycroft motori,
6 heilautom. oljutr. snellum,
línuspæli, 16 fj. radara, litekkoloddi,
GPS við korti og stórum skermi,
gummibáti og sjálvstýrara til sølu.

Báturin hevur fiskiloyvi 5B.

**Tlf. 318949 / 551092**

# FM KAPPING
## & Gallaveitsla

Í samband við at Badmintonsamband Føroya og Borðtennissamband Føroya,

**leygardagin 22. apríl 2006**

fara at hava eina felags FM kapping og gallaveitslu, vilja vit fegin bjóða øllum leikarum, venjarum, hjalparfólkum og øðrum áhugaðum við til hetta tiltak.

Dagurin byrjar kl. 10:00 í Badmintonhøllini við einum sokallaðum finaludegi, har allar finalurnar í vaksnamannadeildunum í badminton og borðtennis blíva leiktar.

Kl. 19:30 um kvøldið verður skipað fyri eini rimmar gallaveitslu, har steypahandan og val av ársins leikarum verður á skránni.

Umframt hetta verður felagssangur, undirhald og ymiskt annað á skránni.

Kostnaðurin fyri alt tiltakið verður kr. 100,00 fyri hvønn.

Tilmelding fer fram hjá feløgunum í seinasta lagi mikudagin 19. apríl 2006.

*Við ítróttarkvøðu*
**Badmintonsamband Føroya og Borðtennissamband Føroya**

# Jarðarstykki í Nólsoy til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 129 b, Nólsoy til sølu.

Ognin er eitt jarðarstykki, ið er 1178 m² til víddar og liggur úti á Eiðinum.

**Nærri fæst at vita á tlf. 327130 ella 281130**

# Tilboð ynskist

uppá at skifta takið á bygdarskúlanum í Miðvági.

Tilboðini skulu vera inni í seinasta lagi 24. apríl 2006 kl. 16.00.

Áhugað kunnu venda sær til umsjónarmannin á tlf. 219429.

**Miðvágs kommuna**

# Sølufólk

Vit sóknast eftir tveimum sølufólkum til Vøruhúsið á Hjalla. Eitt innan búnýti og eitt innan máling, trægólv og hvítvørur.

Arbeiðið umfatar m.a. avgreiðslu av kundum og røkt av handlinum.

Ert tú fyrikomandi, dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt, so send okkum eina skrivliga umsókn innan 22. apríl 2006 til

**P/f Litaval**
Postboks 1019
110 Tórshavn

Meira fæst at vita við at venda sær til Gunnvá, tlf. 342500.

LITAVAL P/F

# Almanna- og Heilsurøktara-felagið

Aðalfundur felagsins verður hósdagin 20. apríl 2006 á Hotel Føroyum. Byrjað verður við morgunmati kl. 9.30.

Skrá sambært lógum felagsins.

Klokkan 14.00 heldur Elisabeth Akursmørk fyrilestur undir heitinum: Finn tína styrki! – og skapa tað lív tú ynskir tær.

**Nevndin**

# Aðalfundur

Lýst verður til aðalfundar, leygardagin 20. mai 2006, samb. lógum okkara um aðalfund.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

**Ítróttasamband Føroya**

# Fólk søkist

Vit søkja eftir fólki at byrja skjótast gjørligt.

Tey, ið hava royndir innan matgerð hava fyrimun.

**Tlf. 321618**

# Eysturoyingar

**Nýtt teoriskeið byrjar mikukvøldið 19. apríl kl. 18.00**

**Tilmelding hjá:**
**Hugo Kristiansen, tel 225225**
**Jari Lykke, tel 50 30 02**
**Mikkjal Hansen, tel 722 578**

**Eysturoyar Teoriskúli**

# Avloysari fyri maskinmann

FAROE SEAFOOD

Søkt verður eftir einum fólki sum avloysara fyri maskinmann, at byrja sum skjótast.
Arbeiðstíðin er í samband við dagliga framleiðslu.
Arbeiði umfatar dagligt viðlíkahald av maskinum

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Klæmint á telefon 594020

**P/F Faroe Seafood, Vestara Bryggja**
**Postboks 218 · FO-110 Tórshavn · Tlf. 355555 - Telefax 312631**